

www.oljan.fo

**Jan Müller** 01 - 09 - 2011

# Oljuíløgur nær Føroyum uppá 100 milliardir

Analysa - Nú tað frættist, at bretska oljufelagið BP hevur gjørt av at byggja eitt nýtt framleiðsluskip til Schiehallion oljuleiðina vestan fyri Hetland, kundi verið áhugavert at hugt nærri at hyggja at, hvørjar aðrar útbyggingar av olju- og gassfundum kunnu gerast veruleiki í hesum økinum komandi árini. Laggan Fyrsta útbyggingin av gassleiðum vestan fyri Hetland nakrantíð, Laggan/Tormore er farin í gongd og skal vera klár til at taka í brúk í 2015. Tað er franska Total og danska Dong, sum standa fyri hesi kolveltandi útbygging, ið fevnir um framkomnan útbúnað á havbotninum miðskeiðis millum Hetland og føroyska markið og síðani ein kaðal til Sullom Voe terminalin, har ein stór gassverksmiðja verður bygd. Øll henda verkætlanin er mett at kosta 20-25 milliardir krónur. Framleiðslan av fyrsta gassinum um okkara leiðir kann fáa stóran týdning fyri onnur smærri gassfelt, sum ikki eru nóg stór til at verða bygd út einsamøll men sum í framtíðini kunnu binda í Laggan verkætlanina. Uppá longri sikt kann henda útbygging eisini fáa týdning fyri møgulig gassfund á føroyska landgrunninum, sum tá eisini kunnu binda í tann til ta tíð gjørda infrastrukturin. Clair risin Tætt upp at føroyska markinum eru eisini fleiri oljuútbyggingar á tekniborðinum. Tað var í 1978, at BP fann risastóru oljukelduna Clair, men sum tá ikki var hugsingur um at seta hol á, tí táverandi tøknin til at fáa tungu oljuna upp var ikki tøk. Hetta er seinni broytt, og fyri nøkrum árum síðani tók BP fyrsta partin av hesum risafeltinum í brúk. Nú verður so farið undir næsta útbyggingarstigið, sum nevnist Clair Ridge. Her verður talan um eina íløgu uppá einar 25 milliardir krónur. Rosebank og Cambo Síðani standa tvær aðrar stórar útbyggingar fyri framman. Mest frammaliga er Rosebank/Lochnagar, ið liggur bert fáa fjórðingar frá føroyska markinum. Chevron, sum er fyristøðufelag fer at taka endaliga avgerð um útbygging í 2013, men nógv bendir á, at her verður ein framleiðla um nøkur

ár. Eitt sindur longur syðri og enn tættari føroyska markinum er Cambooljukeldan, sum Amerada Hess hevur ábyrgdina av. Eisini hon verðjur mett lønandi og verður endalig støða tikin til útbygging komandi tvey árini. Tað eru so eisini gjørd fleiri onnur gass- og oljufund vestan fyri Hetland, sum vit fara at hoyra meira til komandi árini, eitt nú Suilven, Tornado, Handcross, Solan, Glenlivet og onnur. Fleiri av oljufeløgunum, sum arbeiða vestan fyri Hetland, hava so eisini fleiri leitibrunnar á skránni og liggja nakrir teirra tætt upp at føroyska markinum. 100 milliardir Leggja vit allar hesar famtíðar íløgurnar saman - útbyggingina og endurnýggjanina av Schiehallion oljufeltinum, gassútbyggingina á Totalleiðini, Clairútbyggingina, útbyggingarnar av Rosebank og Cambo umframt aðrar møguligar útbyggingar og mongu leitibrunnarnar komandi árini, so er tað á góðari leið, um vit siga, at samlaða íløgan í oljuútbyggingar vestan fyri Hetland og í mongum førum heilt tætt føroyska markinum, komandi 5-10 árini fara at nærkast 100 milliardum krónum. Tað er greitt, at henda positiva gongdin vestan fyri Hetland kann fáa týdning fyri Føroyar eisini, tí hon fer at hava við sær, at vit í framtíðini fara at síggja eitt vælútbygt undirstøðukervi og kolvetnisframleiðslu heilt tætt upp at føroyska markinum. So menningin har kann vera við til at skapa grundarlag fyri menning her hjá okkum eisini. Taka vit stóru tølini kunnu vit til sammetingar siga, at oljufeløg í 2011 fara at brúka umleið eina milliard í oljuleiting við Føroyar.